## Gríma væl nøgd

TÍÐINDASKRIV

Skemtileikurin "Fótur í hosu" eftir Súsonnu og Hans Torgarð hevur verið ógvuliga væl vitjaður. Nú hava tey í Grímu spælt leikin 20 ferðir.

Um tú hevur hug at sleppa at flenna eina løtu skalt tú eitt kvøldið leita tær í Gamla Meiaríið. Har framførir Gríma júst nú farsuna "Fótur í hosu" Higartil hava 20 sýningar verið og tilsamans hava umleið 1700 fólk sæð leikin, og eru tey í Grímu sera væl nøgd við hetta.

Leikurin hevur fingið sera góða móttøku bæði frá fjølmiðlunum og áskoðararnar. Tað hevur verið sagt, at hetta er framføring á allheimsstøði, og leikararnir umframt rithøvundar hava fingið sera góð skoðsmál.

Leikurin varð frumframførdur 29. september, og nú nærkast teimum seinastu sýninugunum. Komandi sýningarnar verða á Gamla Meiarínum 27. og 28. oktober klokkan 18.00 og týsdagin 30. oktober klokkan 20.00.

Atgongumerki eru til sølu á Kunningarstovuni, tlf 31 57 88 og annars á Meiarínum ein tíma undan sýning.

# Aria spælir á Kambsdali



**Leygarkvøldið fer poppbólkurin Aria at spæla til dans í ítróttarhøllini á Kambsdali**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Klaksvíksbólkurin Aria fer um vikuskiftið á pallin aftur.

Tað verður á Kambsdali, har stórur dansur verður í ítróttarhøllini leygarkvøldið.

Aria fer at spæla eitt bland av sínum egnu sangum og sangum hjá øðrum.

Aria spældi á Kambsdali í farna mánaði, og tá vóru fleiri eini 500 fólk til dansin.

Aria gjørdi serliga vart við seg í 1999 og í 2000, tá teir vóru við í Prix Føroyum og góvu væl dámdu fløguna, After These Messages, út.

Teir, sum manna Aria leygarkvøldið, eru Jógvan Hansen (sang), Petur Hans Niclasen (gittar), Erik Biskopstø (bass), Magni Husgaard (ljómborð) og Høgni Klakkstein.

# Taliban-heimasíðan rakt av teldusníkum

TELDUSNÍKAR
*Ingrid Bjarnastein*

Heimasíðan hjá Taliban stýrinum, sum er at finna undir www.talibanonline.com hevur verið úti fyri "herverki". Ein teldusníkur, við navninum MaxMouse, hevur hackað seg inn á heimasíðuna.

Hesin MaxMouse hevur broytt alt innihaldið á heimasíðuni, og tá tú loggar teg á síðuna hoyrir tú amerikanska tjóðsangin, og á síðuni stendur, at USA fer nú at oyðileggja Afganistan. "Tit koma at gjalda fyri hetta tykkara tápulingar – Gud signi Amerika!"

Síðan er ognað teimum, ið lótu lív undir álopunum á World Trade Center 11. september í ár.

Heimasíðan www.talibanonline.com hevur ongantíð verið hackað fyrr, men aðrar heimasíður um taliban hava verið útsettar fyri slíkum teldusníkum.

# Fingu hóttanarbrøv á miðari nátt

**– Trupulleikin er, at Tórshavnar Býráð ikki vil hava nakran sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag, sigur Mariann Dam, ið er álitiskvinna hjá dagrøktarum í Kollafirði. Tær hava ongan hug at boyggja seg fyri kravinum hjá býráðnum, og tí veit hon ikki, hvussu leingi verkfallið verður**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*

Mikukvøldið gingu tvey umboð frá starvsfólkadeildini hjá Tórshavnar býráði húsagongd í Kollafirði. Við sær høvdu tey brøv, har sagt varð frá, at setanarviðurskiftini hjá dagrøktarum í Kollafirði við Tórshavnar býráð hervið eru endað.

Dagrøktararnir vórðu sagdir úr starvi, um teir ikki møttu til arbeiðis hósdagin. Tað gjørdu teir ikki, og harvið vórðu teir sagdir úr starvi.

Mariann Dam metir hesi brøv sum eina hóttan.

– Her komu tveir menn á dyr við brævi, ið boðaði frá, at eg varð uppsøgd, møtti eg ikki til arbeiðis, sigur Mariann Dam.

Hon heldur, at veruligi trupulleikin er, at býráðið ikki vil hava nakað samstarv við Føroya Arbeiðarafelag. Hetta hevur býráðið tó ongantíð sagt bart út, men tað kann lesast millum linjurnar.



### Boygdu seg

– Vit gingu við til at fara undir sáttmálan fyri dagrøktarar hjá Starvsmannafelagnum, hóast hetta merkir, at vit fóru niður í løn. Hetta bar tó ikki til, sigur Mariann.

Hetta er ikki í tráð við tað, ið Jan Christiansen sigur við útvarpið mikudagin. Har sigur hann, at býráðið ikki hevur nakran trupulleika við, at dagrøktararnir eru limir í Kollafjarða Arbeiðsmannafelagi. Trupulleikin er, at býráðið ikki fer at gera tveir sáttmálar um sama starvsøki.

Mariann Dam sigur, at hon ongantíð hevði droymt um, at tað fór at enda við verkfalli. Eini 80 børn hava verið í dagrøkt í Kollafirði, og tí eru fleiri foreldur, ið ikki sleppa til arbeiðis.

Enn er óvist um Tórshavnar býráð fer at søkja eftir nýggjum dagrøktarum í Kollafirði, men tað verður óivað torført at finna nakran, ið vil átaka sær hetta.



# Endurskoðaða navnalógin á gáttini

**Uppskotið um at broyta núverandi navnalóggávu er lagt fyri tingið. Ætlanin er, at løgtingið skal viðgera málið í komandi viku. Høgni Hoydal, landsstýrismaður, kallar endurskoðaðu lógina fyri eina liberalisering**

NAVNALÓG
*Heri á Rógvi*

Tað er Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, sum umsitur málið í landsstýrinum. Hann sigur í sambandi við endurskoðaðu lógina, at tað var neyðugt at endurskoða navnalóggávuna. Hann sigur eisini, at navnalóggávan higartil hevur roynst væl, og royndirnar, sum eru higartil eru gjørdar við navnalóggávuni, vísa, at tað bæði er neyðugt við navnalóggávuni og at endurskoða hesa somu lóg. Hann kallar tað eina liberalisering av navnalóggávuni.

Hóast nevndin eftir øllum at døma varð sett longu aftur í 1999, so merkir tað ikki, at einki hevur verið at hoyrt um málið í løgtinginum.



*Høgni Hoydal hevur lagt eitt uppskot um broytingar í navnalógini fyri løgtingið. Fyrsta viðgerð verður væntandi í komandi viku*

Lisbeth L. Petersen, løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin, legði 3. mars í ár eitt uppskot til samtyktar fyri løgtingið, har varð á landsstýrið um at leggja lógaruppskot fyri tingið um broytingar í løgtingslógini um fólkanøvn.

Eftir viðgerð í tingi og í nevnd, so varð uppskotið samtykt, hóast ein meiriluti í rættarnevndini ikki tók undir við uppskotinum.

Lisbeth L. Petersen sigur, at tað hon helt tað vera neyðugt at gera broytingar. Hon fíltist eisini á, at navnanevndin ikki altíð virkaði sum hon skuldi. Eisini helt hon fyri, at einki uppskot var komið frá landsstýrismanninum, hóast hetta hevði verið væntandi í longri tíð.

### Nevnd sett

Tað var í 1992, at føroyingar fingu hina nógv umtalaðu navnalógina. Í november 1999 setti landsstýrismaðurin í lógarmálum, Høgni Hoydal, eina nevnd at endurskoða navnalóggávuna. Nevndin, sum varð sett at endorskoða navnalóggávuna, varð mannað av: Anfinni Johansen, Onnu Brimnes, Marjun Bæk, Jákupi Nielsen, Sørin Pram Sørensen og Eyðbjørn Larsen. Nevndin hevur skrivað 1. juni 2001 sum dagin, tá álitið varð latið úr hondum við viðmerkingum.

### Greiðari

Endurskoðaða navnalógin ætlar at broyta galdandi lóg á nøkrum økjum. Tað verður tó ikki nøkur grundleggjandi broyting, sum verður gjørd. Tað verður framvegis navnanevndin og í serligum førum landsstýrismaðurin, sum framvegis fara at áseta, hvussu skal vera við nøvnunum.

Tað verður sagt í viðmerkingunum til endurskoðaðu lógina, at endamálið er at gera navnalógina greiðari og harvið léttari at umsita. Eisini verður dentur lagdur á, at endurskoðaða navnalógin skal fáa til vegar heimild fyri at taka onnur fyrilit enn bert tey málfrøðiligu. Eisini verður léttari hjá ættleiddum at broyta navn. Sum heild verður tað í uppskotinum roynt at gera hana greiðari, tá nógvar atfinningar hava verið hesum viðvíkjandi.

# Navnalógin – ein spurningur um mál og mannarætt

**Hóast vit fingu eina navnalóg í 1992, so steðgaði almenna kjaki ikki av hesi orsøk. Hóast vit í næstum eftir ætlan skulu fáa eina greiðari og liberaliseraða lóg, so eru fleiri av teimum grundleggjandi spurningunum framvegis ósvaraðir**

NAVNALÓG
*Heri á Rógvi*

Tað var altso í tí guds ári 1992, at føroyingar fingu eina navnalóg. Henda góða lóg ásetti føroysku foreldrum, at hesi skuldu navngeva børn teirra eftir einum lista hjá navnanevndini. Hetta vakti ans ímillum fólk. Serliga tá fleiri av teimum nøvnunum, sum hava verið nýtt í Føroyum í langa tíð, ikki fingu innivist á listanum hjá navnanevndini. Fleiri dømi eru eisini um fólk, sum leitaðu í onnur lond fyri at doypa ella navngeva teirra børnum. Eisini finnst dømi um eina gentu, sum slapp at vera »til«, tá stavsetingin í navni hennara ikki samsvaraði við ásetingarnar um snið í lógini. Gentan var fleiri ára gomul, áðrenn tað eydnaðist henni at vera »til«.



*Hugurin at geva børnum føroyskum nøvn tykist at vera vaksandi.*

Málfrøðingar hava ført fram tað sjónarmið, at tað er sera óheppið at hava eitt mál í skrift og eitt annað í talu. Tað er serliga við hesum sjónarmiðinum sum grundarlag, at tað í lógini verður ásett, at nøvn, sum longu eru til í føroyskum sniði bert vera loyvd í føroyskum sniði.

Anfinnur Johansen, málfrøðingur, sum bæði er limur í málnevndini og í limur í nevndini, ið varð sett at endurskoða navnalógina, vísir á, at tað er eingin orsøk til, at vit skulu taka útlendskar formar inn í tað føroyska málið. Hann vísir eisini á, at tað tykist sum um, at føroyingar líkasum hava tikið lógina til sín. Hetta sigur hann í sambandi við, at navnanevndin ikki fær eins nógvar fyrispurningar um útlendsk nøvn sum áður. Eisini vísir hann á, at fleiri av okkara grannalondum hava strangari lógir enn vit hava hesum viðvíkjandi.

Eisini Bjarni Bæk, dómpróstur, sigur, at tað eru færri og færri umbønir um »óvanlig« nøvn. Prestar kunnu undir virkandi lóg ikki bara doypa eitt barn tað navn, ið teir hava hug til, tá hetta er at meta sum lógarbrot, tá navnið ikki er góðkent á navnalistanum ella av málnevnd ella landsstýrismanni.

Grundlógarnevndin hevur í sínum arbeiði eisini tikið hetta sama evni upp at venda. Á heimasíðuni hjá Grundlógarnevndini stendur at lesa um, hvørt tað er eitt mannarættindi at geva børnunum tað navn ein ynskir. Á heimasíðuni verða tvey sjónarmið førd fram: – Skulu mannarættindini – rætturin til eitt navn, tað persónliga frælsið ella framsøgufrælsið – trumfa føroysku navnalógina og seta hana til viks ?

– Er atlitið til føroyskt mál ein nóg góð grundgeving fyri at hava eina.

Hesir spurningur tykist tó meira ósvaraðir enn nakað annað. Høgni Hoydal, landsstýrismaður, sigur, at hetta viðvíkjandi talufrælsi er ein stór misskiljing.

– Tað snýr seg um, hvussu títt navn verður skrásett. Annars hevur tú allar møguleikar at kalla teg júst hvat tú vilt, sigur Høgni Hoydal. Hann heldur als ikki, at hann á nakran hátt er við til at skerja frælsið.

Heldur ikki Anfinni Johansen, málfrøðingi, dámar hetta við at skerja frælsið við nanvalógini. Hann vísir á, at útlendsk nøvn í føroyskum við útlendskum sniði hava einki at gera í føroyskum máli.

Tað verður væntandi ein løta enn, áðrenn Ánanias og lítli Tarzan fara at spæla saman.